# Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Dagfesting: 13. januar 2020
Mál nr.: 20/00019-2

**Uppskot til kunngerð um broyting í kunngerð um taðing sent til hoyringar**

Umhvørvis- og vinnumálaráðið sendir við hesum uppskot til kunngerð um broyting í kunngerð nr. 72 frá 29. mai 2012 um taðing (taðingarkunngerðini) til hoyringar.

Endamálið við uppskotinum er at geva kommununum heimild at geva ábyrgdarum sambært taðingarkunngerðini undantaksloyvi til undir nærri tilskilaðum treytum at sleppa sær av við tøð í úrtíð, t.e. uttan fyri tað lógarfesta taðingartíðarskeiðið sbrt. § 6, stk. 1, í taðingarkunngerðini, t.e. millum 15. mars og 15. oktobur.

Sambært uppskotinum, skal ein kommuna kunna geva undantaksloyvi, tá ið ólag á skipanum ella innrættingum ella týðandi fyrilit fyri øðrum virksemi gera tað neyðugt. Sum dømi um tað síðsta kann nevnast, at tørvur í onkrum føri hevur verið á at útseta ætlaða taðing út um 15. oktobur orsakað av týðandi fyrilitum fyri alivirksemi út fyri taðingarlendinum.

Sambært uppskotinum skal ábyrgdarin í skrivligari umsókn um undantaksloyvi lýsa tørvin, ætlanina, nøgdina og slagið av tøðum, staðsetingina, støddina á lendinum, har ið ætlanin er at spræna tøðini, og við hvørjum millumbili ætlanin er at taða.

Sambært uppskotinum skal ein kommuna, sum gevur undantaksloyvi til at spræna tøð í úrtíð, beinanvegin við almennari lýsing á svørtu talvu, heimasíðu ella aðrastaðni kunna sínar borgarar loyvið og treytirnar fyri tí.

§ 6, stk. 3-6, í galdandi taðingarkunngerð, sum snúgva seg um undantaksloyvir fram til 1. januar 2017, verða strikað.

**Freistin at lata inn ummæli er týsdagin 21. januar 2020.**

Gongin 7 • FO-100 Tórshavn

Tel: +298 306600 • Fax: +298 306665 • E-mail: uvmr@uvmr.fo